## Design, brúkslist og antikk í Lítluvík

Um vikuskiftið verður Smiðjan í Lítluvík í Havn karmur um eina heldur øðrvísi søluframsýning, har Rannvá í Baianstovu og Torgerð Suðuroy sýna fram. Tær hava báðar hvør í sínum lag fingist við at skapa, og áralongu royndirnar síggjast aftur, tá tær sýna fram tað, ið tær hava evnað til úr ymsum tilfari. Talan er um klæðir, brúkslist og prýðislutir. Umframt eru antikvitetir eisini við. Torgerð Suðuroy hevur í mong ár fingist við ymsa brúkslist, eins og framleiðslu av prýðislutum. Nevnast kunnu væl kendu hornini, ið kunnu nýtast til drykkjubikar, umframt at hon eisini ger lampur o.a.. Og nevnast mugu smúkkurnar, oftast úr silvuri, ið hon evnar til. Í Vági rekur hon antikkhandil, ið nevnist Nýtt og Gott Gamalt. Á framsýningini hevur Torgerð eisini antikvitetir við, so sum møblar, ljósakrúnur, gyngustólar, klaverbenkur, steintoy og annað.



## Sniðgivin klæði

Rannvá í Baianstovu hevur í mong ár sniðgivið, og hon rekur í dag Faroese Fashion. Hon byrjaði longu í 1962 at sniðgeva, og Rannvá byrjaði Faroese Fashion í 1982. Fyritøkan ger klæðir úr føroyskun tilfari, og umframt í Føroyum, eru vørurnar umbidnar í t.d. Íslandi, Danmark og USA, og limir í danska kongshúsinum hava eisini havt pløgg frá Faroese Fashion. Meira sæst á www.faroesefashion.com. Opið er í Lítluvík frá fríggjadegnum 20/11 til týsdagin 24/11-09. Allar dagar er opið frá klokkan 10:00 til 19:00, tó sunnudagin frá 14:00 til 20:00.

# Powerprinsessa í Hvonn Live

**Lone Rasmussen vendi ótta og ótryggleika í ungdómsárunum til eitt lív við fullari ferð. Nú kallar hon seg powerprinsessa og biður fólk liva lívið, sum tey hava hug at liva tað. Leygarkvøldið verður hon við í sendingini Hvonn Live á Rás2**

POWERPRINSESSA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Um hetta er lívið, so tími eg tað ikki.

Tað vóru tankar, sum settu dám á ungdómsárini hjá Lone Rasmussen. Hon kendi seg ótrygga, malplaseraða og uttanfyri. Men eftir at hon hevði lisið eina bók við boðskapi um at hugsa konstruktivt um seg sjálvan og onnur, setti hon sær fyri at broyta lívið hjá sær.

Og nú kallar Lone Rasmussen seg powerprinsessa og ráðgevur kvinnum um, hvussu tær kunnu fara frá einum lívi sum tann pena gentan til at vera ein powerprinsessa. Tað snýr seg millum annað um drivi, sjálvsálit og at bjóða sær sjálvum av.

- Tað ræður um at verða tann, sum tú í veruleikanum ert. Eg havi merkt á egnum kroppi, hvussu oyðileggjandi og vónleyst tað er at royna at verða onkur annar enn tann, sum mann er, sigur Lone Rasmussen.

Hon hevur skrivað bókina Powerprinsessa og hevur ført hugtakið víðari við eitt nú fyrilestrum fyri høgum og lágum.

### Vitjar Hvonn Live

Leygarkvøldið vitjar Lone Rasmussen á Hvonn í Havn, haðani Rás2 sendir sendingina Hvonn Live. Lone Rasmussen fer at geva ráð um, hvussu tað ber til at broyta lívið hjá sær og verða meira opin fyri tí, sum lívið bjóðar.

Lone Rasmussen undirvísur eisini í erotiskum dansi, og hon bjóðar føroyskum kvinnum til dansifrálæru í Yndi í Havn leygardagin klokkan 15.00 og frá klokkan 18.30 verður hon í Rex, har hon fer at hava fyrilestur.



*Lone Rasmussen tosar um, hvussu kvinnur kunnu sleppa teymunum, sum tær hava á sær sjálvum*

BAKKAFROST



Maskinmeistari

**Søkt verður eftir maskinmeistara/ maskinmanni til Faroe Salmon Processing.**

Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving. Arbeitt verður saman við einum maskinmeistara á einari av tveimum skiftivaktum.

Tann, ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Starvið verður sett skjótast tilber.

Løn og setanartreytir eru í samráð við leiðsluna.

**Starvsstaður:** á Glyvrum.

**Umsóknarfreist er :** 30/11

Áhugað biðjast senda umsókn til:

Faroe Salmon Processing
Bakkavegur
FO-625 Glyvrar
kari@bakkafrost.com

Bakkafrost samtakið framleiðir laks og líðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum, 1 kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES.

Tað starvast umleið 300 fólk í samtakinum.

Sosialurin / KvR 34 18 00

Bakkavegur 8 · FO-625 Glyvrar · Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com · www.bakkafrost.com